*Umhvørvið kannast undan oljuvinnu:*

# Sjey oljufeløg stuðla kanning

*BIOFAR hevur í hesum døgum samráðingar við sjey stór oljufeløg um at kanna føroyska umhvørvið, áðrenn oljuvinna tekur seg upp á okkara leiðum*

Ikki færri enn sjey stór altjóða oljufeløg eru sinnað til at vera við til at fíggja eina kanninga av føroyska umhvørvinum, sum BIOFAR í Kaldbak er við at fyrireika.

Arne Nørrevang, leiðari á Biofar-støðini í Kaldbak sigur við Sosialin, at tað snýr sg um eina sokallaða grundarlagskannin, áðrenn ein møgulig oljuvinna byrjar. Hetta verður gjørt flestu staðni, har oljuvinna tekur seg upp.

Arne Nørrevang sigur, at vit tó hava tann fyrimuninat kunna læra av royndunum hjá øðrum og er tað ein orsøkin til, at henda kanning verður gjørd nú væl áðrenn ein møgulig oljuvinna fer í gongd.

Tað er vanligt, at oljufeløgini sjálvi, hetta er partur av linsenstreytunum, skipa fyri slíkum umhvørviskanningum.

-Við at fara í gongd longu nú, so eru vit upp á forkant við hesum kanningum, og tað kann bara vera gott sigur Arne Nørrevang.

Uppá fyrispurning um ikki tað kann liggja eia binding tí at lata privat oljufeløg fíggja slíkt sigur Arne Nørrevang, at tað ger tað so avgjørt ikki.

Hetta er ein heilt óbindandi avtala, og eg dugi einki skeivt at síggja í tí, at oljufeløgini longu nú, væl áðrenn tey annars skuldu gjørt hetta í sambandi við komandi lisensir, eru við í einum slíkum projekti.

Landsstýrið hevur eisini játtað at stuðla verkætlanini, sum fer at kostar 1-2 mill. kr.

Farið verður í gongd eftir nýggjár, og fer støðin í Kaldsbak at vera karmurin um kanningarnar, sum faraat vara í eini trý ár. Fólk verða sett aftrat, og nýggj útgerð skal eisini keypast.

Tey sjey oljufeløgini, sum talan er um, eru Statoil, Enterprice, Mobil, Conoco, Amoco, BP og Amerada Hess.

**Umhvørvið alt at siga**

Í sambandi við verkætlanina hevur ein umboðsmaður fyri amerikanska oljufelagið Amerada Hess júst verið í Føroyum.

Martin Fergusson frá Amerada Hess sigur við Sosialin, at teir fegnir vilja vera við til at stuðla umrøddu kanning av umhvørvinum.

-Vit leggja sera stóran dent á umhvørvisspurningar. Tað er altavgerandi, at umhvørvið ikki verður nervað av eini komandi oljuvinnu. Til tess er neyðugt at hava gjørt eina kanning, sum neyvt sigur, hvørjum standi hetta umhrøvið er í longu í dag sigur Martin Fergusson.

Hann vísir á, at oljufeløgini hava eina sera stóra ábyrgd júst mótvegis umhvørvinum, har einn oljuvinna tekur seg upp.

-Tit liva burturav av fiski, og kemur tað so langt sum at tit finna olju í undirgrundini, so er altavgerandi, at ein oljuvinna ikki nervar fiskastovnarnar og fiskivinnuna.

Umboðsmaðurin hjá Amerada Hess heldur, at føroyingar kunnu fáa nógv burtur úr teimum royndum, sum oljufeløghava gjørt í Norðsjónum. Her hava feløgini eisini stuðlað umhvørviskanningum, og úrslitini frá teimum kunnu vera hent at brúka eisini hjá føroyingum, nú umhvørvið skal kannast her.

Tey sjey feløgini, sum talan er um nú skulu til at vera við í fíggingini av umhvørvinum eru feløg, sum øll arbeiða í Norðsjónum, og sum í dag eisini arbeiða vestan fyri Hetland.

Amerada Hess er tað felagið, sum hevur fingið tillutað flestu lisensir vestan fyri Hetland.

jan



*Arne Nørrevang og Martin Fergusson frá Amerada Hess hava um dagarnar tosað um stóru umhvørviskanningina hjá BIOFAR. Mynd kalmar*


## GOTT BINGO

verður í Pálsstovu
sunnudagin
23. okt. kl. 16[00]
**Nógvir góðir vinningar,
so sum matur og
10 gávukort á 500 kr.
15 vinningar á lutaseðli
– høvuðsvinningur 1.500 kr.
Drigið verður millum spølini
Eykaspælið er gávukort 2.000 kr.
Koyring heim aftaná.**

***Øll eru hjartaliga vælkomin***

**Gjáar Samkomuhús**



TIP& VIND
1 X 2

**TIPS-dystir**
í viku nr. 43
29./30. oktober

1. Everton–Arsenal
2. Ipswich–Liverpool
3. Manchester U–Newcastle

4. Nottingh F–Blackburn
5. Queens P R–Aston Villa
6. Sheffield W–Chelsea

7. Southampton–Leeds
8. Tottenham–West Ham
9. AaB–Næstved

10. AGF–Lyngby FC
11. Brøndby–FC København
12. Fremad Amager–Silkeborg
13. OB–Ikast


## Eykaaðalfundurin

hjá Pf. Sosialurin, sum13 okt. varð lýstur at vera 25. okt. 1994, verður týsdagin 1. november 1994, kl. 18 á Argjavegi 26, 160 Argir við áður lýstu skrá.

**Nevndin**

## KUNNGERÐ
### um
### útgjalding av arbeiðsloysistrygging sum ískoyti til lønarinntøku

Við heimild í § 1, stk. 4 í løgtingslóg nr. 17 frá 10. mars 1992 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing við seinni broytingum hevur stýrið fyri arbeiðsloysistryggingina og arbeiðsávísingina fyrisett:

**§ 1.** Tryggingartakari, sum í mesta lagi arbeiðir 20 tímar, ella vunnið verður í mesat lagi kr. 2.260, í einum tveimum vikurs útgjaldingartíðarskeiði, er at rokna sum tøkur á arbeiðsmarknaðinum og hevur ti rætt til arbeiðsloysistrygging sambært lógini.

**Stk. 2.** 67% av lønini sambært 1 stk. verður drigin frá arbeiðsloysistryggingini.

**§ 2.** Rætturin til arbeiðsloysistrygging sambært regluna frammanfyri er treytaður av, at tryggingartakarin letur Arbeiðsloysisskipanini eina skrivliga váttan (leysgevisváttan) frá avvarðandi arbeiðsgevara um, at tryggingartakarin hevur rætt til beinanvegin at fara úr starvinum, um tryggingartakarin fær bjóðað annað starv við longri arbeiðstíð.

**Stk. 2.** Rætturin til arbeiðsloysistrygging sambært hesa reglu er eisini treytaður av, at tryggingartakarin aðru hvørja viku letur Arbeiðsloysisskipanini oyðublað, sum skal vera undirskrivað av avvarðandi arbeiðsgevara og tryggingartakara.

**§ 3.** Hendan kunngerð fær gildi dagin eftir, hon er kunngjørd.

**Stýrið fyri arbeiðsloysistryggingina og arbeiðsávísingina,**
*26. september 1994*


OKKARA DYGD -TÍN TRYGD!

HJÁ OKKUM FÆRT TÚ: DYGDAR FRAMKALLAN
1. flokks myndir * Kodak Royal-pappír * Myndagaranti * Avsláttarkort * Fotoalbum

FOTO DANMARKS FOTOHANDLERFORENING FAGHANDEL

Postboks 1058 - 110 Tórshavn - Tlf. 19820

SMS FOTO & VIDEO

*Vit taka myndir tínar í ramasta álvara*



**LÁGORKU FRYSTIBOKSIR**
fyri EINANS 1.950,-
Eftir skatta frádrátt **1.170,-**

J. D. IMPORT
Klaksvík
Tlf. 57013 - 87013
*Best um kvøldið*